

Siv Jensen, fíggjarmálaráðharri og formaður í norska Framsóknarflokkinum. Mynd: EPA

# Norskur stjórnarflokkur vil leita eftir meir olju

**Jógvan Hugo Gardar**

06.05.2015 - 10:31

Oljan.fo

Norski stjórnarflokkurin, Framsóknarflokkurin, hevur havt landsfund, og har bleiv staðfest at flokkurin heldur seg til sína gomlu kós, sum er meir oljuleiting, og eitt sindur av grønari orku.

Forkvinnan í flokkinum, Siv Jensen, ið eisini er fíggjarmálaráðharri, segði í síni røðu til landsfundin, at oljan hevur merkt Noreg og norskan búskap í 40 ár, og tað kemur hon eisini at gera í framtíðini.

- Sjálvt um oljuvinnan í løtuni hevur nógvar krevjandi avbjóðingar, so kemur oljuvinnan at hava stóran týdning fyri Noreg í nógv ar afturat. Tí er tað av týdningi at okkara oljumálaráðharrin, Tord Lien, úr Framsóknarflokkinum, skrivar út fleiri leitiloyvir í Barentshavinum, segði Siv jensen.

- Vit mugu eisini leggja til rættis fyri nýggjum vinnum. Í eini broytingartíð eiga vit at leggja til rættis fyri at meir verður brúkt til orku sum kann endurnýtast, segði hon.